# Høvdu stolið milliónir

Løgreglan á flogvøllinum í Kelfavík í Íslandi tók fyrradagin ein týskara og ein rumena, sum ætlaðu sær av landinum. Í viðførinum hjá monnunum fann løgreglan fleiri milliónir íslendskar krónur, sum menninir høvdu tikið úr ymsum sjálvtøkum í Reykjavík. Blaðið Vísir vil vera við, at talan var um einar 10 milliónir íslendskar krónur. Sum skilst høvdu menninir stolið sjálvtøkukort uttanlands og vóru síðani farnir til Íslands at brúka tey, skrivar Vísir.



*Tveir menn brúktu stolin kort til at taka fleiri milliónir íslendskar krónur úr sjálvtøkum (Mynd: Vísir)*

# Bankar tjena væl

Árið í fjør royndist væl hjá teimum donsku bankunum. Í hvussu er vísir ein samanteljing hjá tíðarritinum Bankinfo, at bankarnir høvdu 39 milliardir kónur í avlopi fyri skatt í 2007. Bankinfo skrivar, at talið er stórt sæð tað sama sum árið fyri og svarar til, at eginpeningurin bleiv forrentaður við 19 prosentum. Nú á nýggjárinum var eginpeningurin hjá bankunum 219 milliardir krónur ímóti 198 milliardum eitt ár frammanundan.

TACC 2008

# Vindmyllan sparir h



**Tað nýggjasta innan alternativa orku í húsarhaldinum eru smáar vindmyllur, ið geva orku beinleiðis til ketilin, so oljufýringin koyrir minni og harvið brúkar minni olju. - Eg haldi, at hetta sær ógvuliga spennandi út, og tað er stuttligt at vita sær, at tú klárar at halda húsini heit – partvís við vindi, sum á ongan hátt dálkar okkara umhvørvi, sigur William Smith, ið hevur havt vindmyllu við góðum úrsliti síðan oktober í fjør**

VINDORKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Oljan er dýr og er vorðin ein rættiliga tyngjandi partur av einum húsarhaldi, bæði hjá ungum familjum við børnum, men so sanniliga eisini hjá teimum, sum eru komin til pensjónsaldur og bara hava pensjónina at liva av.

Mangur man undra seg yvir, at tað almenna ikki langt síðan hevur tikið burtur oljuavgjaldið, soleiðis at oljan kundi verið tað bíligari. Myndugleikunum so líkt skjóta teir seg inn undir, at høgi oljuprísurin kanska er tálmandi fyri nýtsluna, og størri nýtsla fremur meira dálking.

Svend Auken, fyrrverandi danskur umhvørvisráðharri, hevur sagt, at tá ið tað almenna leggur avgjøld á eitt nú olju fyri at minka um dálking, eigur tað almenna eisini at gjalda ein part av hesum peningi útaftur, so fólk fáa ráð til at bjálva sær húsini betur, skifta vindeygu og hurðar og kanska finna sær aðrar orkukeldur, ið dálka minni.

Umhvørvisráðharrin hevur eisini sagt, at tað gevur onga meining at leggja almenn avgjøld á eitt nú olju, um ein partur av avgjaldinum ikki verður brúktur til at minka um nýtsluna av dálkandi orkukeldum.

Høgi oljuprísurin hevur fingið fólk til at royna aðrar møguleikar, eitt nú við sólorku, hitapumpum og vindmyllum.

## Smáar myllur

Øllum kunnugt eru vindmyllur ikki nýtt uppfinnilsi. Úti í heimi hava vit í nógv ár sæð smáar og stórar vindmylluparkir, sum geva orku inn á el-netið. Myllurnar eru vorðnar betri, størri og sterkari.

Eisini her hjá okkum er gongd í vindorkuni.

SEV hevur nú í fleiri ár havt eina vindmyllu standandi í Neshaga, og fyri fáum árum síðan setti felagið tríggjar størri vindmyllur upp aftrat. Úrslitini hava verið so mikið góð, at elfelagið nú hevur gjørt av at seta enn fleiri og størri vindmyllur upp í Neshaga. Eisini felagið Sp/f Røkt í Vestmanna framleiðir og selir streym, ið framleiddur verður við vindi, inn á netið hjá SEV.

At vindorka munar, kann staðfestast við úttalilsum hjá Henningi Jacobsen, verkfrøðingi hjá SEV, sum hevur sagt, at tær tríggjar størru vindmyllurnar í Neshaga eru nóg mikið til at bera streymin hjá øllum húsarhaldum á eystursíðuni á Skálafjørðinum.

Tað nýggjasta innan alternativa orku í húsarhaldinum eru smáar vindmyllur, ið geva orku beinleiðis til ketilin, so oljufýringin koyrir minni og brúkar harvið minni olju.

Nakrir sethúsaeigarar hava longu útvegað sær smáar kinverskar myllur, sum settar verða upp á grundøkinum. Ein teirra er William Smith, sum býr í Sørvági, og ein annar er Jóhan Simonsen, sum býr í Hoyvík. Aðrir eru eisini í holt við at seta sær slíkar myllur upp og sum skilst, er áhugin fyri hesum sera stórur.

At síggja til, er hesar myllur lítið størri enn hampiliga stórir veðurhanar. Tær eru 180 metur í tvørmát.

## Ógvuliga spennandi

William Smith, ið er maðurin, sum hevur gingið á odda við hesum smáu vindmyllunum, sigur, at teir fingu samband við ein føroying, sum býr í Bretlandi, og hesin hevði sambond til Kina, har teir framleiða hesar myllur, ið kallast HWG 600.

- Eg haldi, at hesar hava røttu støddina og røttu styrkina til føroyska veðurlagið. Kinverjar lova, at myllurnar geva 750 watt, men við eini minni tillaging fái eg tær at geva 2.700 watt.

William setti sína myllu upp í oktober mánaða í fjør og royndirnar, hann higartil hevur gjørt sær, eru sera góðar. Vit fara at venda aftur til ítøkiligu royndirnar seinni í greinini.

Sjálvur er William útbúgvin handverkari, og umframt tað er hann eisini elektrikari, maskinmaður og flogteknikari.

- Úrslitið, sum eg nú eri komin til við mínum royndum at hita ketilin við vindmylluni, er mítt konsept, um eg so kann siga.

Hann sigur, at stýringarnar, sum fylgdu við kinversku myllunum, bygdu á prinsippið um javnstreym, men at hann hevur tikið allar hesar stýringar burtur, soleiðis at myllan nú framleiðir veksilstreym, sum tað verður rópt. Eisini hevur hann styrkt »krúnuna«, sum bløðini er fest í, soleiðis at myllan í dag tolir í minsta lagi 80 metrar/ sek.

- Eg havi tillagað mylluna so sterka og einfalda sum gjørligt, tí endamálið er eittans; at framleiða mest møguliga orku til ketilin, so oljufýringin gongur minst møguligt.

Willian sigur, at hann leingi hevur gingið og hugsað um, hvussu hann á mest orkusparandi hátt kundi fáa steðgirnar ímillum, nær oljufýringin gongur, at gerast longri, so oljunýtslan og